## Kall stuðlar inniróðrinum

Havnar Róðrarfelag og Kall hava gjørt stuðulsavtalu um komandi FM-kappingina í inniróðri. Hendan verður tann 16. februar, og fer kappingin nú at bera heitið, Kall-kappingin. Á www.drekin.fo, sum er heimasíðan hjá Havnar Róðrarfelag, ber nú til at tekna seg til kappingina, ið verður skipað í fleiri aldurs- og vektbólkum, eins og liðkapping eisini er á skránni.



## Hálvfinalur í komandi viku

Klokkutíðir eru nú settar á, nær hálvfinalurnar í Coca-Cola kappingini hjá monnum og kvinnum verða spældar. Hjá kvinnunum spæla VB-Stjørnan komandi mikukvøld klokkan 18, og hóskvøldið verður so dystur millum Tjaldur og Kyndil klokkan 18.30. Hjá monnum er dystur millum StÍF og Kyndil II mikukvøldið klokkan 18.30. Hósdagin spæla H71 og Kyndil, og byrjar tann dysturin klokkan 20.00



*Tað er als ikki óhugsandi, at ovari vøllur í Gundadali eisini fer at leggja graslíki til onkran landsdyst komandi tíðina*

# Fevnir eisini um lands-dystir

**Altjóða góðkenningin av ovara vølli í Havn fevnir eisini um landsdystir. Men hetta er neyvan aktuelt hjá A-landsliðnum fyrstu tvey árini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við altjóða góðkenningini, sum ovari vøllur fekk í gjár, hava Føroyar nú tríggjar vøllir á listanum yvir vøllir, sum kunnu nýtast til fótbóltslandsdystir.

Tað vil siga, at tað í prinsippinum ikki er nøkur forðing, fyri at heimadystir hjá føroysku landsliðunum kunnu spælast á vøllinum.

- Tað er eitt mál, sum als ikki hevur verið til umrøðu hjá okkum enn. Men tað ber væl til at ímynda sær, at dystir hjá onkrum av yngru landsliðunum nú verða spældir har, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF.

- Hvat viðvíkur A-landsliðnum, so er tann spurningurin ikki serliga aktuellur í løtuni. Vanliga mannagongdin er tann, at vit fráboða FIFA, hvørjar vøllir vit hava tøkar til okkara heimadystir, longu tá kappingarskráin verður løgd. Tá hetta varð gjørt til komandi undankapping, høvdu vit bara tveir vøllir við altjóða góðkenning, so á listanum til dystirnar fyri 2008 og 2009 standa bara Svangaskarð og Tórsvøllur.

- Um talan í framtíðini verður um at spæla dystir á ovara vølli, dugi eg als ikki at siga. Tað er so nakað, sum skal takast upp av nevndini hjá FSF. Men er talan um undankappingardystir, so er hetta neyvan aktuelt, fyrr enn farið verður undir fyrireikingarnar til undankappingina til EM í 2012.

# Manchester skorar og skjýtur mest



*Hann driblar, skjýtur og skorar. Cristiano Ronaldo er higar til mest málsókni spælarin í ensku Premier League*
*Mynd: Polfoto/AP*

**Hagtøl fyri ensku Premier League vísa, at Manchester United er lið, sum hevur málsóknasta spælið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*Jakup@sosialurin.fo*

Manchester United er ikki bara liðið, sum skorar mest í ensku Premier League. Seinast hagtølini frá Opta Stats geva nevnliga reyðu viðhaldsfólkunum nógv at reypa um. Manchester United er nevnliga liðið, sum hevur flestu royndirnar móti mótstøðumálinum, flestu royndirnar, ið raka málið og so eiga teir sjálvandi eisini besta málskjúttan higar til hetta kappingarárið. Nevnliga Cristiano Ronaldo. Og sum um tað ikki var nóg mikið, so er Ronaldo eisini tann spælarin, ið við 99 renningum við bóltinum hevur havt flestu driblingarnar.

Hagtølini fevna um alskyns kynstur á vøllinum. Soleiðis vita hagfrøðingarnir hjá Opta Stats at siga, at Ronaldo er ídnasti skjúttin við 65 royndum móti málinum. Francesc Fabregas úr Arsenal er spælarin, sum dugir best at finna viðspælararnar, og Nigel Reo Cooker úr Aston Villa hevur 104 tacklingar á tí listanum. David Bentley úr Blackburn hevur sent ikki færri enn 240 bóltar innfyri, og Emmanuel Adebayor úr Arsenal hevur verið rangstaddur 41 ferðir. Ikki heilt óvæntað er Alan Smith úr Newcastle tann spælarin, ið hevur framt flestu frísparkini (58), tó at liðið, sum toppar frísparkslistan, er Blackburn við 337 av slagnum.

Talvurnar her á síðuni sýna nøkur av teimum hagtølum, ið Opta Stats hevur gjørt fyri Premier League higar til hetta kappingarárið.

| Málverjar | Lið | Bjargingar | Bjarg/skot |
|---|---|---|---|
| Hahnemann | Reading | 89 | 65% |
| James | Portsmouth | 80 | 78% |
| Friedel | Blackburn | 69 | 70% |
| Niemi | Fulham | 65 | 68% |
| Green | West Ham | 64 | 76% |

| Tackarar | Lið | Tacklingar | Væleydnaðar |
|---|---|---|---|
| Reo-Coker | Aston Villa | 104 | 78% |
| Clichy | Arsenal | 95 | 84% |
| Mascherano | Liverpool | 91 | 74% |
| Malbranque | Tottenham | 83 | 81% |
| Muamba | Birmingham | 83 | 71% |

| Avleverar | Lið | Avlev. | Neyvleiki |
|---|---|---|---|
| Fabregas | Arsenal | 1204 | 80% |
| Hamann | Man City | 1038 | 83% |
| Flamini | Arsenal | 1030 | 86% |
| Clichy | Arsenal | 1020 | 82% |
| Ferdinand | Man Utd | 958 | 85% |

| Málskjúttar | Lið | Mál | Mál/skot | |
|---|---|---|---|---|
| Ronaldo | Man Utd | 16 | 25% | |
| Adebayor | Arsenal | 13 | 24% | |
| Torres | Liverpool | 11 | 19% | |
| Anelka | Chelsea/Bolton | | 10 | 23% |
| Keane | Tottenham | 10 | 22% | |

| Lið | Mál | Skot | Á málið | Neyvleiki | Rættar avlev. |
|---|---|---|---|---|---|
| Arsenal | 43 | 265 | 116 | 44% | 8507 |
| Aston Villa | 40 | 241 | 105 | 44% | 4422 |
| Birmingham | 23 | 184 | 81 | 44% | 4198 |
| Blackburn | 30 | 247 | 109 | 44% | 5870 |
| Bolton | 24 | 182 | 77 | 42% | 4761 |
| Chelsea | 35 | 258 | 105 | 41% | 8208 |
| Derby | 10 | 171 | 63 | 37% | 4858 |
| Everton | 38 | 214 | 103 | 48% | 4636 |
| Fulham | 23 | 208 | 92 | 44% | 4059 |
| Liverpool | 35 | 318 | 129 | 41% | 7019 |
| Man City | 29 | 186 | 84 | 45% | 6562 |
| Man Utd | 44 | 320 | 152 | 48% | 8209 |
| Middlesbrough | 19 | 203 | 84 | 41% | 5323 |
| Newcastle | 27 | 214 | 92 | 43% | 5399 |
| Portsmouth | 31 | 251 | 103 | 41% | 5172 |
| Reading | 30 | 196 | 79 | 40% | 3737 |
| Sunderland | 22 | 209 | 82 | 39% | 5252 |
| Tottenham | 42 | 247 | 105 | 43% | 6655 |
| West Ham | 27 | 222 | 87 | 39% | 5387 |
| Wigan | 22 | 195 | 69 | 35% | 4671 |

| Bad Boys | Lið | Fríspørk | Gult k. | Reytt k. | Stig |
|---|---|---|---|---|---|
| Smith | Newcastle | 58 | 7 | 1 | 85 |
| Reo-Coker | Aston Villa | 53 | 7 | 1 | 80 |
| Cole | West Ham | 53 | 7 | 0 | 74 |